Sandoy Seafood

# MASKINMAÐUR

Søkt verður eftir royndum maskinmanni at byrja skjótast til ber. Talan er um virkini í Skopun og heima á Sandi.

Løn sambært avtalu.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Martin Olsen, virkisleiðari á tel 211 316.

Umsóknir skulu sendast til:
**SANDOY SEAFOOD**
240 Skopun
Att. Andreas F. Hansen

# Ekspetrisa
## TIL FÓTBÚNA

Søkt verður eftir fólki m/k at byrja skjótast gjørligt. Starvið er fulla tíð og løn sambært avtalu.

Ring og fá nærri at vita.

Pf. FÓTBÚNI
TRÓNDARGØTA 23 · TLF. 311705
EURO SKO EURO SKO



# Hús til sølu

Húsini á Hamarssniðið 18 í Klaksvík eru til sølu til hægstbjóðandi.
Byggiár: 1985 · Stødd: 11 x 8 metrar.
2 hæddir og stór garasja.

**Tel 457223 / 217223**



# Gallaveitsla

Í sambandi við at **Badmintonsamband Føroya, Borðtennissamband Føroya** og **Judosamband Føroya**, leygardagin 28 apríl 2007, fara at hava eina felags FM kapping og gallaveitslu, vilja vit fegin bjóða øllum leikarum, venjarum, hjalparfólkum og øðrum áhugaðum við til hetta tiltak.

Dagurin byrjar kl. 12:00 í Badmintonhøllini við einum sokallaðum finaludegi, har einans finalur í badminton, borðtennis og judo blíva leiktar.

Kl. 19:00 um kvøldið verður skipað fyri eini rimmar gallaveitslu, har steypahandan og val av ársins leikarum v.m verður á skránni.

Umframt hetta verður felagssangur og ymiskt undirhald.

Aftaná verður dansur og diskotek.

Kostnaðurin fyri alt tiltakið verður kr. 200,00 fyri vaksin og kr. 100,00 fyri børn undir 15 ár.

Tilmelding fer fram hjá feløgunum í seinasta lagi mikudagin 25. apríl 2007.

***Við ítróttarkvøðu***

***Badmintonsamband Føroya***
***Borðtennissamband Føroya***
***Judosamband Føroya***

# Bilførari

Søkt verður eftir einum bilførara við stóra koyrikortinum og kranaloyvið, at byrja skjótast gjørligt.

Dentur verður lagdur á at verða álítandi, ágrýtin, fleksibul, kundavinarligur og røkin.

Áhuga kunnu seta seg í samband við okkum á tlf. 236236.

**J. H. Transport Spf**
Undir Kerjum 1
FO-100 Tórshavn
Tlf. 356356 · Fax 356357

J. H. Transport er ein fyritøka sum fæst við flutning av ymiskum slag umframt skrot og endurnýtslu.

Hondbóltsamband Føroya
The Faroese Handball Federation

Hondbóltssambandið (HSF) skal siga frá, at aðalfundur felagsins verður í ÍSF-húsinum leygardagin 26. mai kl. 10.00

**Hondbóltssamband Føroya**
319669 / 227122

# Ársaðalfundur

Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag hevur ársaðalfund Kristi Himmalsferðardag 17. mai 2007 kl. 15.00 í Missiónshúsinum í Leirvík.

**Fundarskrá:**

1. Ársfrágreiðing
2. Ársroknskapur
3. Val av nevndarlimum
4. Val av tiltakslimi
5. Val av grannskoðara
6. Ymiskt

Uppskot, sum limir ynskja at koma til viðgerðar á aðalfundi, og uppskot til nevndarlimir, mega vera formanninum, Una Næs, 530 Fuglafjørður, í hendi 8 dagar framman undan aðalfundinum.

Í samband við aðalfundin, verður eisini alment møti í Missiónshúsinum í Leirvík kl. 19.

KRISTILIGT LURTARA OG HYGGJARAFELAG

Mørkin 10 · 530 Fuglafjørður · tel 44 40 13
klh@klh.fo · www.klh.fo

Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag er einasta skipaða lurtara- og hyggjarafelag í Føroyum. Endamál felagsins er at virka fyri kristiligum sendingum í almennu fjølmiðlunum í útvarpi og sjónvarpi sum t.d. gudstænastum, kristiligum fundum, andaktum, kristiligum sangi og tónleiki, tíðindum frá kristiligum arbeiði o.t.

KLH styðjar útvarp og sjónvarp í góðum og sømiligum sendingum. KLH arbeiðir ímóti at útvarp og sjónvarp verða nýtt til ósømiligar sendingar og annað, sum er ikki kristnum siði og kristnari trúgv verdugt.

Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag er ein limafelagsskapur við umleið 1400 limum. Tekna teg sum lim í KLH og ver soleiðis uppií arbeiðinum fyri góðum tilfari í útvarpi og sjónvarpi.

# Vistarheimið Fugloyarvegur 1

Loppumarknaður og kaffisøla verður í terapiini á Vistarheiminum í Torfinsgøtu 8 flaggdagin 25. apríl frá kl. 10:00 til 16:00.

**Tórshavnar Privata Vistarheim**
Fugloyarvegur 1 · 100 Tórshavn